# Klassiskt undirhald í hini operaini

**Á debutkonsertini hjá Andras Olsen vísti basunsnillingurin, at klassiskur tónleikur kann vera øgiliga undirhaldandi. Konsertin var eitt show við kovboyhattum, klovnaframførslu og eini smakksroynd av onkrum heilt fantastiskum.**

*Orð: Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Símun Jóannesarson*



*Andras Olsen spældi eina frálíka konsert í hini operaini*

Den Anden Opera var á tremur við fólki, allir stólar vóru fyltir, tá Andras Olsen í friggjakvøldið spældi sína debutkonsert. Debutkonsertin er eitt slag av próvtøku ella endakonsert fyri hansara lestur á Det Kongelige Danske Musikkonservatorium. Seks verk vóru á skránni, millum hesi vóru frumframførslur av nýggjum verkum hjá Sunnleivi Rasmussen og Tróndi Bogasyni.

## Vildi takast av bóli

Í skránni, ið vit fingu stungna í hondina á veg inn, skrivaði Andras millum annað, at hann hevði lagt seg eftir at spæla nýggjari tónleik hetta kvøldið. Hetta var ikki tí, at tað eru fá stórverk skrivaði til basun gjøgnum tíðirnar. Men heldur tí hann vildi vísa teir møguleikar, ið hann sær í basuntónleiki, og hvat hann ætlar sær at fáast við, nú hann var liðugur við lesturin. Hann segði somuleiðis, at hann hevði hugsað seg sjálvan í áskoðararnar stað, tá hann legði skránna. Sum áskoðari vildi hann fegin takast av bóli, og hetta hevði hann so roynt..

Konsertin var býtt upp í tveir partar, fyrri parturin var meira siðbundin í framførsluni, meðan tann seinni spældi uppá nógv fleiri streingir.

## Varð tikin av bóli

Andras Olsen legði fyri við einum verkið hjá Jaques Castérède, Sonatine for basun og klaver. Hetta verkið var í trimum partum, og tók veruliga áskoðaran av bóli við sínum stóra fjølbroytni. Hetta fyrsta verk varð spælt av Andras Olsen á basun og Thomas Gooseman á klaver. Verkið var í trimum pørtum. Fyrsti patur var villur og lívligur, síðan kom ein sera friðarligur partur og seinasti parturin var festligur og lívligur á ein bandittasligan hátt. Andras hevði megnað at tikið meg av bóli.

## Kitlaði forvitnið

Næsta verkið var The Bells Of Vienta, hjá Bent Sørensen. Eitt verk har vit upplivdu basunina á ein heilt annan og meira ekstreman hátt. Við einum Harmon dempara og songrøddini hjá Andras ígjøgnum basunina, var verkið fyri meg meira áhugavert, enn tað var gott. Mítt forvitni bleiv tó kitlað.

## Ófrættakent

Seinasta verkið í fyrra parti var frumframførsla av verkinum Apparition/ Dispariation hjá Sunnleivi Rasmussen. Verkið er skrivað til basun og slagverk. Við sær á slagverkið hevði Andras Olsen fingið Mathias Friis Hansen. Verkið hevði okkurt ófrættakent yvir sær, tað var øgiliga skiftandi við sterkum kontrastum. Frá tí villa og ógvusliga til tað meira friðarliga, men alla tíðina var ein kensla av rótloysi í luftini.

## Klovnurin Andras Olsen

Eftir steðgin gjørdist konsertin í størri mun eitt show enn áðrenn steðgin. Fyrst við stykkinum hjá Luciano Berio, Sequenza V, ið er eitt sera torført stykki. Berio skrivaði Sequenzaðir til 13 ljóðføri. Sequenza V er til basun. Andras segði í skránni, at flestu tónleikarar halda, at Sequenza stykkini eru tey torførastu og bestu stykkini, ið eru skrivað til teirra ljóðføri, og fyri Andras var Sequenza V einki undantak.

Sequenza V er skrivað til minnis um sveitsiska skemtaran og klovnin Karl Adrian "Grock" Wettach. Stykkið er gjørt yvir eina framførslu hjá Grock undir 2. heimsbardaga fyri nasistunum.

Meðan Andras spældi hetta torføra stykki, framførdi hann somuleiðisa eina klovnaframførslu. Her var ríkiligt av yvirskoti at hóma og vísti, at framførslur av klassiskum tónleiki kunnu vera sera festligar.

## Eitt fantastiskt listarligt bland

Síðan kom framførslan av 7 Musicians, ið er eitt brot úr stórverkinum The Investigation Of A Dog, ið tónasmiðurin Tróndur Bogason, Andras sjálvur, dansarinnan og koreografurin Rannvá Káradóttir, filmskaparin Marianna Mørkøre og ljósmaðurin Egil Hansen samstarvast um. 7 Musicians var eitt fantastiskt bland av ymsum listagreinum, ið saman skaptu eina frálíka heild. Hetta var ein smakksroynd, og hon smakkaði so væl, at vit kunnu gleða okkum til alt verkið verður liðugt. The Investigation Of A Dong verður ein dramatisk framførsla, ið verður umleið ein tíma, tá tað er heilt liðugt. verkið er bygt á eina stuttsøgu hjá Kafka um ein hund, ið leitar eftir sannleikanum.

## Kovboyarar fyri basun og trompet

Andras endaði við at framføra kovboystykkið Kit Bones & Hawk Hardon hjá Frederik Høgberg. Hetta stykkið er ein duellur millum tveir kovboyarar á basun og trompet. Í hesum verkinum var Anders Nyqvist við á trompet, og hesir báðir í kovboyhatti gjørdu endan á konsertini sera stuttligan. Verkið var kryddað við Clint Eastwood setningum sum "Go ahead – make my day" og "This town ain't big enough for both of us". Hetta stykkið spældu Andras og Frederik eisini, tá teir vóru uppi í próvtøku á The Royal Academy Of Music í London.

Konsertin gjørdist ein frálík uppliving, og um hetta umboðar, tað ið Andras ætlar sær at fáast við, nú hann er liðugur á konservatoriinum, so hava vit føroyingar nógvar stórar tónleikaupplivingar í væntu.



*Foreldrini Kári og Ása vóru komin til Keypmannahavnar á konsert og vóru sera errin av soninum*